JENS

# myndablaðið NÚ

Nr. 4 ☆ Apríl 1975
2. árg. ☆ Kostn. 7 kr.




## Føroyingur 23 ár í New York

10 ár aftaná

Starin

Lesarateigur

Almannastovan

Kapping

Mangt og hvat


Løgmansveitsla 1975


Kvinna tikið skiparaprógv






# er komin —

# Sosiala deildin er farin

**Nú gerst tað ikki umaftur: Týsdagin 1. apríl yvirtóku vit sosialu umsitingina. Higartil hevur ríkisumboðið staði fyri henni. Við í yvirtøkuni fylgir alt starvsfólkið, eini 15 í tali, og stjórin verður framvegis at eita Klaus Hermann.**



Klaus Herman, sum eisini varð yvirtikin henda dagin, takkaði fyrst á donskum og tók so yvir á føroyskum



Frá samkomuni



Húsini yviri í Jónas Broncksgøtu, har Almannastovan heldur til Vit kundu eisini kalla myndina »Slottið og hitt lítla húsið ella — heim, heim kæra heim

## Heimastýrislógin í nýtslu

»Hetta er fyrstu ferð at grein 9 í heimastýrislógini verður tikin í nýtslu til at flyta umsitingina av einum størri málsøki frá ríkinum til landsstýri. Og hetta er eisini fyrstu ferð at landið yvirtekur ein heilan bólk av starvsfólkum frá ríkinum«, segði Leif Groth, ríkisumboðsmaður, í røðu síni á einari samkomu á yvirtøkudegnum. Samkoman bleiv hildin í hølunum hjá almannastovuni í Jónas Broncksgøtu. Til steðar vóru umboð fyri Landsstýrið og Ríkið og starvsfólk frá ríkisumboðsskrivstovuni og almannastovuni.

## Rætt at yvirtaka

Leif Groth greiddi frá teimum samráðingum, sum hava verið í samband við yvirtøkuna. Hesar samráðingar eru so at siga loknar, eftir standa bert nøkur smámál, sum landsstýri skal samráast beinleiðis við donsku stjórnina um. Ríkisumboðsmaðurin segði yvirtøkuna vera eitt náttúrligt lið í eini menning, sum hevur verið og framvegis fer at vera í føroyska samfelagnum. »Menningin í føroyska samfelagnum ber náttúrliga í sær, at føroysku myndugleikarnir sjálvir átaka sær leiðsluna av alt fleiri málsøkjum. Og samgongusáttmálin hjá landsstýrinum ber eisini á henda bógv.«

Síðani handaði Leif Groth ríkisumboðsmaður Jákupi Lindenskov lyklarnar til Almannastovuna.

Jákup Lindenskov landsstýrismaður tók nú orðið og helt fyri, at tað var rætt at yvirtaka sosialu umsitingina »tí her eru træðrir, sum nerta so mong heim og so mong menniskju, at neyðugt er, at løggevarin kennir tey einstøku viðurskiftini so neyvt sum gjørligt«. Hann segði sosialmálini verða so týðandi, at fyri at tey kunna røkjast til fulnar, krevst eitt ógvuliga neyvt samarbeiði millum umsitingina og løggávuvaldið.

Eisini Klaus Hermann, stjóri á almannastovuni, helt tað vera rætt at yvirtaka og segði hann, at tað ongantíð hevði verið ivi um hetta hjá nøkrum av starvsfólkunum. »Ja, vit starvsfólk eru á hesum várdegi fró .... Hinvegin eru vit ikki alt fólkið, men vit vóna — og rokna við, at hetta umskifti eisini skal gera fró okkara viðskiftafólk — okkara »klientar«, ið hvussu er fleiri — meira fró«. Hann takkaði Landsstýrinum fyri at tað vildi yvirtaka alt starvsfólkið. Klaus Hermann endaði røðu sína við at ynskja at virki hjá almannastovuni má fara fram í góðum samstarvi við Landsstýri og onnur til gleði og gagns fyri alt Føroya fólk.